## 80 deyð av bumbum í Bagdad

Tríggjar haðrar bumbuspreingingar vóru í miðbýnum í Bagdad í morgun, og sambært løgregluni hava minst 80 fólk latið lív, og 128 eru særd. Løgreglan sigur, at tað var stutt ímillum spreingingarnar. Eygleiðarar halda, at bumburnar kunnu hava samband við valið, sum ætlandi verður í februar, tí víðgongdar kreftir hava hótt við at órógva valið. Tað hevur annars verið rættiliga friðarligt í Irak tann seinasta mánaðin, men sunnimuslimskir felagsskapir og stuðlar hjá tí ólógliga Baath-flokkinum eru ein støðug hóttan ímóti friðinum, skrivar Reuters úr Bagdad.



## Brown sparir

Í morgin fer bretska stjórnin at viðgera uppskotið hjá stjórnini til fíggjarlóg fyri 2010. Sambært uppskotinum ætlar stjórnin hjá Gordon Brown at skarva umleið 12 milliardir pund av teimum almennu útreiðslunum tey næstu fýra árini. Einki verður sagt um, hvat skal sparast, og Alistair Darling, fíggjarmálaráðharri, sigur, at tað fer stjórnin ikki at avdúka fyrr enn til várs. Bretskir fjølmiðlar siga seg hava frætt frá sínum politisku keldum, at sparingarnar fara serliga at raka heilsuverkið, men tað vil stjórnin ikki gera viðmerkingar til, skrivar Reuters úr London.

# DNA skal hjálpa løgregluni

**Annika Olsen, landsstýriskvinna í lógarmálum, miðar ímóti at fáa eitt uppskot um DNA-profilar lagt fyri Tingið í hesari setuni, og kann hetta lógaruppskot koma í gildi komandi summar**

DNA-PROFILAR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Annika Olsen heldur tað vera sera óheppi, at løgreglan ikki kann brúka dna-royndir, og tí verður miðað í móti at fáa lóg um hetta setta í gildi komandi summar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroyar munnu eftirhondini vera einasta landið í vesturheiminum, at løgraglan ikki hevur møguleika at nýta DNA at hjálpa sær við í stríðnum móti kriminaliteti.

- Tað má sigast, at tað er ógvuliga óheppi, at løgreglan ikki kann nýta DNA í sínum arbeiði. Danmark fekk sína DNA-skrá í 2000, og er hetta ein týðandi liður hjá løgregluni at finna fram itl brotsmenn, sigur Annika Olsen.

DNA-profilar eru ein stór hjálp hjá løgregluni í málum sum eitt nú drápi, neyðtøku, siðamisnýtslu og harðskapi.

- Lógin var meiri ella minni klár at seta í gildi í vár, men ein dómur í Onglandi sáddei iva um donsku DNA-skránna. Hóast ein persónur varð fríkendur, var hansara DNA-profilur framvegis í skránni, og tað var mett at vera brot á mannarættindini, sigur Annika Olsen.

Ætlanin var tá at seta lógina í gildi kortini og so broyta hana, tá eitt endaligt úrslit fyrilá um donsku skipanina, men hetta mælti danska løgmálaráðið frá. Og tí er lógin um DNA-skráseting ikki komin í gildi í Føroyum enn.

### Innanhýsis arbeiðsskrá

Nú verður so miðað eftir at fáa lagt lógina fyri Løgtingið í hesari tingsetuni, og tað skuldi so merkt, at lógin kann setast í gildi einaferð komandi summar.

- Tað eru greiðar reglur um, nær løgreglan kann gera brúk av DNA. Alt, sum verður savnað av einum ástaði – har eitt brotsverk er framt – kann verða nakkað fyri DNA, og tað verður ein sera stór hjálp hjá løgregluni, sigur Annika Olsen.

DNA kann vinnast úr eitt nú hári, negl ella blóði, og er munandi tryggari eyðmerking enn til dømis blóðroynd. Feilmarginan er eitt til fleiri milliónir.

Men fyri at kunna loyva DNA royndum er neyðugt at broyta rættargangslógina, so løgregluni verður loyvt at taka hesar DNA royndir.

- DNA'ið verður so goymt í einari skrá hjá løgregluni, og eingin óviðkomandi fær atgongd til skránna. Hon fer at virka sum ein innanhýsis arbeiðsskrá hjá løgregluni, sigur Annika Olsen.

Lógvarbroytingin fer at lætta munandi um hjá løgregluni at staðfesta, um ein skuldsettur hevur verið á ástaðnum ella ikki, og harvið verður eisini munandi lættari at fella ella fríkenna ein mistonktan.

# Vitanartilfeingi til Ráðgevarabankan

**Vinnuframagrunninum tørvar vitanartilfeingi til Ráðgevarabankan. Endamálið við Ráðgevarabankanum er at gera tað lættari hjá íverksetarum at finna røttu ráðgevingina, tá ið farið verður undir nýtt virksemi, ella tá ið kapitalgrundarlagið í virkinum skal hækkast**

TÍÐINDASKRIV

Vinnuframagrunnurin letur stuðul til íverksetarar, áðrenn tey fara undir nýtt virksemi. Á hesum stigi kann íverksetarin søkja um stuðul, ið kann brúkast til at keypa neyðuga serfrøðingaráðgeving innan viðurskifti, sum hava við stovnan av nýggjum virksemi at gera. Eisini letur Vinnuframagrunnurin stuðul til íverksetarar og ung virki, sum í sambandi við hækkan av kapitalgrundarlagi í virkinum kunnu keypa sær neyðuga ráðgeving.

Fyri at fáa stuðul skal virksemi hjá íverksetaranum vera nýskapandi og hava ein marknað uttanfyri Føroyar.

Íverksetarar søkja um stuðul til ráðgeving við at venda sær til Vinnuframagrunnin. Um umsóknin verður gingin á møti, hevur íverksetarin rætt til ráðgeving frá ráðgevum, sum Vinnuframagrunnurin hevur góðkent.

Ráðgevar, ið skráseta seg í Ráðgevarabankanum, skulu hava í minsta lagi 3 ára royndir innan tað økið, ráðgivið verður í. Vinnuframagrunnurin ger av, um ein ráðgevi verður skrásettur í Ráðgevarabankanum.

Vinnuframagrunnurin fer í næstum at skipa fyri kunningartiltaki fyri ráðgevar hjá íverksetarum, har ætlanirnar við Ráðgevarabankanum verða lýstar nærri.

Ráðgevarabankin er at finna á www.vfg.fo.



*Vinnuframagrunnurin heldur til í hesum bygninginum, sum eisini plagdi at hýsa Rúsini*

*Mynd. Álvur Harandsen*